## Færri bilar frá Toyota

Japanska bilfyritøkan Toyota, sum er tann størsta í heiminum, hevur gjørt av at skerja framleiðsluna, tí eftirspurningurin eftir nýggjum bilum er minkaður nógv orsakað av altjóða búskaparkreppuni. Japanskir fjølmiðlar skriva, at Toyota fer at steðga framleiðsluni á einari verksmiðju í Japan, einari í Bretlandi og einari í USA, soleiðis at fyritøkan fer at gera 9,3 milliónir bilar um árið ella 700.000 færri enn nú. Sambært fjølmiðlunum hevur leiðslan í Toyota sett sær sum mál, at fyritøkan skal hava avlop á rakstrinum næsta ár.



## Hall eingin trupulleiki

Tað er eingin trupulleiki, at tann danska fíggjarlógin fyri 2010 ætlandi fer at vísa góðar 86 milliardir krónur í halli. Tað sigur Claus Hjort Frederiksen, fíggjarmálaráðharri, sum legði fíggjarlógaruppskotið fram í gjár. Hann sigur, at sjálvandi er tað ein trupulleiki, um búskaparkreppan stendur við í fleiri ár, men hann vil ikki siga, hvussu mong ár tað danska samfelagið kann liva við einum so stórum halli sum næsta ár. Herfyri segði fyrrverandi forsætisráðharrin Anders Fogh Rasmussen, at pengarnir foosa úr ríkiskassanum, men tey orðini vildi fíggjarmálaráðharrin og floksfelagin ikki gera nakra viðmerking til.

# Til reiðar at taka eitt tørn afturat

**Um ársskiftið skulu limirnir í Føroya Fiskimannafelag velja formann av nýggjum og tað er longu nú greitt, at sitandi formaðurin, Jan Højgaard, ætlar at taka eitt skeið afturat**

FORMANSVAL

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Jan Højgaard er til reiðar at halda fram sum formaður í Føroya Fiskimannafelag í eitt trý ára skeið afturat.

Tað staðfestir hann fyri Sosialinum í dag.

Um ársskiftið skal val aftur vera til starvið sum formaður í Føroya Fiskimannafelag.

Hvørt valskeið er trý ár og sitandi formaðurin sigur, at hann er til reiðar at taka eitt tørn afturat.

Sostatt váttar hann, at hann bjóðar seg fram sum valevnið til formanssessin í Føroya Fiskimannafelag, nú uppstillingin verður í heyst til.

Hann sigur, at hann hevur longu fingið nóg mikið av stillarum til at lata seg stilla upp og tað hevur hann tikið avgerð um at gera.

Fyri at vera valevnið til formmansvalið, skal eitt valevni hava minst fimm stillarar og Jan Højgard sigur, at hann hevur langt síðani fingið neyðugu stillararnar.

Hann sigur, at ein stillari kann vera ein skipsmanning ella ein sýsla.

Valskeiðið hjá nýggja formanninum byrjar 1. februar.

Vit hava ikki frætt um at nakar ætlar at stilla upp ímóti Jan Højgaard.

Tað hevur annars ljóðað, at arbeitt hevur verið fyri at fáa fyrrverandi formannin, Óla Jacobsen, at stilla upp aftur ímóti Jan Højgaard.

Men tað verður ikki, tí Óli Jacobsen sigur, at hann fer ikki at stilla upp.

- Eg eri 66 ára gamalur, so mín tíð er farin, sigur Óli Jacobsen.

Men hann legur afturat, at hann vil fegin stuðla onkrum øðrum, sum ætlar at stilla upp ímóti Jan Højgaard.



*Tað er nú greitt, at Jan Højgaard fer at stilla upp aftur til formansvalið í Føroya Fiskimannafelag, sum verður um ársskiftið. Fyrrverandi formaðurin, Óli Jacobsen, sigur, at hann er sinnaður at stuðla einum mótvalevni*

# Tollfríar sigarettir fara nú niður í helvt

**Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum fer nú at seta kunngerð í gildi, sum avmarkar møguleikarnar hjá ferðafólki at keypa tollfrítt tubbakk**

TOLLFRÍ SØLA

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Á nýggjárinum verður møguleikin hjá ferðafólki at keypa tollfríar sigarettir, minkaðir*

Á nýggjárinum verða møguleikarnir hjá ferðafólki at keypa tollfrítt tubbak til Føroyar, avmarkaðir.

Eftir semjuni í tiltikna Ólavsøkupakkanum hjá samgonguni er avtalað, at nøgdin av tollfríum tubbakki, sum ferðafólk til Føroyar, hava loyvi at keypa, skal minkast niður í helvt.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður í fíggjarmálum hevði málið til umrøðu á landstýrisfundi mánadagin.

Og hann sigur, at hann nú fer at broyta kunngerðina, so at tað frá 1. januar bara verður loyvt at hava akkurát helvtina so nógv tollfrítt tubbakk við sær í land í Føroyum, sum nú.

Landsstýrismaðurin hevur áður gjørt seg til talsmann fyri heilt at avtaka møguleikan at keypa tollfrítt tubbakk við sær til Føroya.

Umframt at tað hevði útvegað landskassanum yvir 20 milliónir í meirinntøkum, hevði tað eisini verið eitt heilsupolitiskt tiltak, tí tað hevði tálmað tubbakksnýtsluni.

Landsstýrismaðurin heldur, at tað er skeivt, at tollfrí innflutningurin skal sleppa at halda fram ótarnaður, samstundis sum tiltøk verða sett í verk fyri at tálma tubbakksnýtsluni annars.

Tí verður møguleikin at keypa tollfrítt nú avmarkaður.

### Ein politisk semja

Men hví so ikki bara taka tað tollfríu søluna heilt av?

- At skerja søluna 50% er eitt úrslit eini politiskari semju. Í hesum sambandi eru atlit tikin til tollfríu søluna á Vága Floghavn, har stúrt varð fyri at grundarlagið kundi heilt verðið skrykt undan tollfría handlinum har. Men atlit eru eisini til ferðavinnuna, har stúrt varð fyri, at hon fór at missa ov nógv, verður tann tollfría sølan heilt avtikin.

At tollfría sølan av tubbakki verður minkað niður í helvt, fer at geva landskassanum eina eyka inntøku upp á 12 milliónir næsta ár.

## Mugu keypa tubbakk saman

Sum støðan er nú, kunnu ferðafólk, ið hava fylt 18 ár, flyta inn tollfrítt: 200 sigarettir, ella 100 sigarillos, ella 50 sigarir ella 250 gramm av tubbakki.

Í samrøðu við Sosialin sigur, Jóannes Eidesgaard, at tollfríi innflutningurin verður skorin akkurát 50%.

Eftir 1. januar verður sostatt bara loyvi at flyta inn tollfrítt: 100 sigarettir, ella 50 sigarillos, ella 25 sigarir ella 125 gramm av tubbakki.

Eitt annað er so hvussu hetta verður í handfarið, tí tað eru 200 sigarettir í einum kartongi. So antin mugu Norrøna og Atlantsflog undir at selja hálv kartong av sigarettum, ella mugu tvey ferðafólk keypa eitt kartong saman.

Upp aftur tvørligari verður tað tá ið tað kemur til tubbakkið, tí tað eru 50 gramm av tubbakki í einum vanligum pakka. Tað merkir, at frá 1. januar verður tað loyvt at keypa tveir og ein hálvan pakka av tubbakki við sær til Føroya tollfrítt – ella mugu tvey ferðafólk keypa ein pakka saman.

Líka galið verður tað við blikkunum við tubbakki til ballimaskinur. Har eru 200 gramm av tubbakki í, so tað verður bara loyvt at keyp ¾ blikk tollfrítt, ella mugu tvey ferðafólk keypa eitt blikk saman.